# Broytingar LKS - At bora niður

Góðu LKS brúkarar

Fleiri broytingar eru gjørdar í skermmyndini, tá man borar seg niður:

1. X við filtur
2. Hoppar “0000 Ógreinað” um
3. Steðgar við síðst brúkta tátt

**Ad 1, X við filtur**
Tá borað verður niður, leggja filtur seg í gráa breddan, og eitt X sæst við hvørt av hesum filtrunum. Við at trýsta á X’ið, verður filtrið strikað. **Sí píl 1** á myndini niðanfyri um dømi upp á eitt X.

**Ad 2, Hoppar “0000 Ógreinað” um**
Tá borað verður niður, verða tættir hoppaðir um, sum onki er bókað á. Um t.d. onki er bókað á “Verkætlan”, verður “Verkætlan” hoppað um. **Sí píl 2** á myndini niðanfyri, sum vísir, at onki filtur er við “Verkætlan” (millum “Endamál” og “Verkevni”), tí onki er bókað á “Verkætlan”, tí hoppað er um “Verkætlan”.

**Ad 3, Steðgar við síðst brúkta tátt**
Tá borað verður niður, ber nú ikki til at bora seg longur enn til síðsta tátt, sum tað er bókað á. Um tað t.d. er bókað á “Verkevni” og ikki víðari eftir kontustronginum, ber sostatt ikki til at bora longur niður enn til “Verkevni”. Tá tað ikki ber til at bora seg longur niður, hvørvur strikan samstundis undir talinum, sum á tann hátt vísir, at man er komin til endan. **Sí píl 3** á myndini niðanfyri. Ongin strika er undir (“Verkevni”) 1000, sum merkir, at onki er bókað aftaná “Verkevni”.

Eisini skal viðmerkjast, at K’ið ikki longur sæst í teimum førum, har ongin bóking er í kontukortinum.

Tit eru vælkomin við viðmerkingum til broytingarnar.

